# rkuríkastu í heiminum


*Yvirlitsmynd við projekteraða vegnum í lendinum*

Víst verður á, at uppskot til loysnir hava verið viðgjørd.

Dygdin á elveitingini frá verkinum skal viðgerast nærri, men verandi elkervið megnar at taka ímóti elframleiðslu frá einari eind.

Umhvørvisárin hava eisini verið viðgjørd við atliti at lendinum, ljóðárinum, fuglalívi og bygging.

Í endanum av samandráttinum verður mælt til at fara undir næsta stig í verkætlanini, sum er projektering og bygging av tunnils alduorkuverki við Nípuna á Vágoynni við tilhoyrandi kanningum.

burtur úr alduni, er kannaður við fysiskum modellroyndum.

## Alduumhvørvið

Lagt verður aftrat, at alduumhvørvið í Føroyum er eitt av teimum orkuríkastu í heiminum. Metta alduorkan við Nípuna er 27 kilo Watt fyri hvønn metur aldukamb.

Við Nípuna er atdjúpt, umleið 20 metrar. Bergið hevur eina henta jarðfrøði til tunnilsendamálið. Staðið verður soleiðis mett at vera hóskandi til endamálið við eini royndarætlan, og verkið kann eisini útbyggjast til at hýsa átta turbinum.

Mett verður, at samlaði kostnaðurin fyri eina útbygging við 1 MW turbinu við Nípuna er umleið 31 miljónir krónur við eini framleiðslu á 1 miljón kilo Watt tímar (kWh) um árið. Átta eindir, ið kunnu framleiða tilsamans 8 miljónir kWh um árið, verða mettar at kosta umleið 93 miljónir krónur. Roknað verður við, at mátingar, rakstur, umsiting og aðrar útreiðslur tað fyrsta árið kosta umleið 9 miljónir krónur.

Í samandráttinum verður mett, at tað tekur umleið eitt ár at projektera og fáa øll loyvi til vega, og somuleiðis verður mett, at sjálv byggitíðin tekur umleið eitt ár.

Eitt ofta nýtt mát fyri kostnaðin av einum slíkum verki er íløgukostnaðurin í krónum fyri hvørt kWh/ ár. Fyri eina eind við Nípuna er hetta tal 31 kr./kWh/ ár, men við átta eindum minkar talið niður í 12 kr./kWh/ ár. Marginalkostnaðurin fyri eina eind við Nípuna er 8 kr./kWh/ ár.

Møguleikarnir fyri ábótum, sum síggjast fyri framman, verður sagt í samandráttinum, eru:

- Lægri turbinukostnaður
- Effektivari turbina
- Færri avmarkingar til staðbundnu eyðkennini

Sagt verður, at næsta stig í verkætlanini er at detailprojektera tunnil og turbinu og at gera neyvari metingar av alduorkuni á staðnum.

## Truplasti parturin

Truplasti parturin av bygginini verður tað síðsta skotið út móti sjónum, eins og sonevnda OWC-kamarið skal spreingjast vandaliga. Haraftrat verður mett, at trýstið frá turbinuni, tá ið verkið koyrir, helst verður so stórt, at ikki verður inniverandi hjá fólki í tunlinum, eins og hetta trýstið kann ávirka úrtøkuna.


*Herfyri skipaði SeWave fyri tíðindafundi, har framløga var um føroyskt alduorkuverk*

Mynd Jens Kr. Vang